

*Meðan tað fyrr hálvár í fjør bert vóru seldar fimm motorsúkklur, so er talið fyrra hálvár í ár heilar 180. Hetta er ein vøkstur upp á 3.500 prosent*

# Sølan av motorsúkklum vaksin við 3.500 prosentum

**Nýggjastu tølini hjá Akstovuni fyri søluna av nýggjum akførum í tíðarsekeiðnum januar-juni 2006, vísa ein týðuligan vøkstur í søluni av persónbilum, vørubilum og kampingvognum. Størsti vøksturin er í søluni av motorsúkklum**

AKFØR

Størsta vøkstrinum í prosentum í søluni av nýggjum akførum standa motorsúkklurnar fyri - heili 3.500 prosent. Í fjør vórðu seldar fimm motorsúkklur í mun til 180 fyrra hálvár í ár.

Sølan av prutlum (skutarar/knallertir) er har aftur ímóti minkað við næstan 50 prosentum.

Fyrra hálvár í fjør vóru seldir 743 persónbilar í mun til 903 í ár - ein vøkstur upp á meira enn 20 prosent. Vørubilarnir høvdu ein vøkstur upp á 50 prosent við 152 í mun til 101 í fjør.

Tilsamans var vøksturin í søluni av nýggjum akførum teir fyrstu seks mánaðirnar í ár upp á næstan 30 prosent við 332 fleiri seldum akførum í mun til somu tíð í fjør.

| Akfaraslag | Jun 2006 | Jun 2005 | Broyting Jun 06/05 | Jan-Jun 2006 | Jan-Jun 2005 | broyting 06/05 | %broyting 06/05 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Brandbilar | 0 | 1 | -1 | 0 | 1 | -1 | -100,00% |
| Bussar | 1 | 0 | 1 | 2 | 2 | 0 | 100,00% |
| Kampingvognur | 5 | 0 | 5 | 19 | 0 | 19 | 100,00% |
| Hýrubilar | 4 | 1 | 3 | 21 | 3 | 18 | 600,00% |
| Lastbilar | 2 | 0 | 2 | 5 | 8 | -3 | -37,50% |
| Leguvognar | 1 | 0 | 1 | 2 | 3 | -1 | -33,33% |
| Líkvognur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0,00% |
| Motorsúkkla | 43 | 2 | 41 | 180 | 5 | 175 | 3500,00% |
| Neyðsendakfar | 3 | 0 | 3 | 4 | 1 | 3 | 300,00% |
| Persónbilar | 179 | 182 | -3 | 903 | 743 | 160 | 21,53% |
| Prutl | 22 | 46 | -24 | 106 | 210 | -104 | -49,52% |
| Pylsuvognur | 0 | 0 | 0 | 3 | 0 | 3 | 100,00% |
| Smábussar | 0 | 0 | 0 | 8 | 3 | 5 | 166,67% |
| Tangabilar | 0 | 0 | 0 | 1 | 3 | -2 | -66,67% |
| Viðfestivognar | 12 | 26 | -14 | 63 | 54 | 9 | 16,67% |
| Vøruvognar | 33 | 28 | 5 | 152 | 101 | 51 | 50,50% |
| Samlað | 305 | 286 | 19 | 1469 | 1137 | 332 | 29,20% |

*Motorsúkklurnar standa fyri størsta vøkstrinum í søluni av nýggjum akførum*

## Royn teg sum filmssjónleikara!

Gongur tú við eini filmstjørnu í búkinum, so fært tú høvi at sleppa henni út nú. FISK 2006, Norðurlendski Filmssummarskúlin, sum fer av bakkastokki 10.-23. juli, søkir eftir fólki til leiklutirnar í filmunum, sum verða framleiddir.

Skúlin søkir eftir bæði mannfólki og konufólki og í øllum aldrum. Næmingarnir á skúlanum skulu framleiða nógvar stuttar filmar gjøgnum skeiðið, og tí verður brúk fyri nógvum sjónleikarum. Skúlin kann ikki bjóða beinleiðis samsýning, men sjónleikararnir fáa sjálvandi allar útreiðslur endurgoldnar og endurgjald fyri kost, meðan teir eru við í verkætlanini. Upptøkurnar fara fram í tveimum umførum: 11.-13. juli og 15.-17. juli. Í fyrra umfarinum nýtist leikarunum bert at vera við ein dag í senn, í seinna umfarinum kann vera brúk fyri einum og sama leikara allar dagarnar. Upptøkurnar fara fram í dagtímunum.

Áhugaði kunnu senda eina mynd av sær sjálvum og upplýsingar um aldur og hvørjar dagar, ið tey kunnu luttaka til teldupostadressuna film@trade.fo. Meira kann lesast um Norðurlendska Filmssummarskúlan á heimasíðuni www.fisk2006.org.

Norðurlendski Filmssummarskúlin er stuðlaður av Nordisk Kulturfond, Mentamálaráðnum og Atlantic Airways o.ø.

## Grannakommunur dystast á leikvølli

**Fótbóltur:** Hesi seinnu árini hevur nógv verið tosað um, hvussu tann kommunala skipanin skal verða í framtíðini.

Fleiri kommunur eru lagdar saman og aðrar eru komnar langt við ætlanini um tað sama. Hvussu verður millum Vestmanna og grannabygdina Kvívík er ilt at siga nakað um enn.

Í øllum førum verður tað ikki lokalpolitikkur sum fer at standa ovast á breddanum seinnapartin sunnudagin, tá ein serstakur dystur verður á skránni.

Tá fara nevniliga bygdaráðslimir úr Vestmanna og Kvívík at spæla móti hvørjum øðrum á plenuni.

Hetta er sjálvandi áhugavert í sjálvum sær, men tað verður uttan iva eisini spennandi at fylgja við, hvussu tað fer at gangast dómaranum í hesum dysti.

Dómari verður nevniliga eingin annar enn landsstýrismaðurin Jacob Vestergaard sum umsitur kommunumál í Tinganesi.

**sb.**

## Bussar aftur og fram

**Koyring:** Hóast væl er av parkeringsplássi í bygdini, so fáa tey vitjandi eitt gott høvi at sleppa bæði til bygdina og heimaftur við bussi.

Skipað er nevniliga soleiðis fyri at náttbussurin fer at koyra millum Vestmanna og Havnina bæði fríggjakvøldið og leygarkvøldið.

Sambært hesi skrá koyrir hann úr Vestmanna kl. 23:30 og 3:30 og úr Havnini kl. 00:30 og 4:30. Leygarkvøldið verður eisini koyrt úr Vestmanna, tá dansurin er liðugur.

Fyri at veita eina so góða tænastu sum tilber verður skipað soleiðis fyri, at bussarnir koyra bæði um Kvívík og Kollafjørð um boðað verður frá hesum.

**sb.**